

Fríðriku Bláhamar, stjóri á Super Dekk í Havn, hevur skriva til allar politikarar á tingi og í landsstýri um at seta í gildi reglur fyri dekk í Føroyum

´Mynd: Jens Kristian Vang

# Fríðrikur vil ávirka løgtingið

**– Vit skulu uppdragast til at skilja, hvussu stóran týdning tað hevur, at vit nýta røttu dekkini til líkindini. Tað sigur Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk í Havn. Fyrsti liður í ætlan hansara er at ávirka okkara kosnu menn og kvinnur, so tey skilja hendan týdning – og soleiðis fáa betur førleika at smíða lógir og kunngerðir. – Hetta er so upplagt, nú eitt einmælt løgting tók undir við null-hugsjónini, heldur Fríðrikur Bláhamar**

DEKK OG FERÐSLUTRYGD

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Tað eru dekkini, sum hava sambandið við vegin. Tí er tað so umráðandi, at vit hava røttu dekkini til tær ymsu umstøðurnar, sum vit koyra í. Tað nyttar so lítið, at vegir og bilar eru so tryggir, um sambandið millum hesar báðar liðir – dekkini – ikki eisini eru í lagi.

Hetta sigur Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Supðer Dekk í Havn, sum hevur skrivað til øll ting- og landsstýrisfólk fyri at greiða teimum frá týdninginum av, at reglur eisini verða gjørdar um dekk og dekknýtslu.

### Ov lin krøv um dekk

Fríðrikur Bláhamar heldur, at krøvini til dekk í Føroyum eru alt ov lin.

– Eg ivist ikki í, at ferðsluvanlukkur og ferðsluóhapp – størri sum smærri – hvødu verið nógv færri, um bilarnir koyrdu við røttu dekkunum, sigur hann.

Krøvini í Føroyum eru sambært kunngerð

*»at dekk á øllumhjólum við mynsturdýpd í minsta lagi 1,6 mm á bili til í mesta lagi 9 persónar og bili við loyvdari heildarvekt upp á í mesta lagi 3.500 kg. Á øðrum bilum skal mynsturdýpdin vera í minsta lagi 1 mm«.*

Fríðrikur Bláhamar sigur, at í øðrum londum er kravið nógv meira útgreinað – serliga í londum á okkara breiddarstigi, og tað heldur hann, at myndugleikarnir í Føroyum eiga at gera nakað við.

– Trupulleikin er, at vit í alt ov stóran mun avrita danskar ónýtiligar lógir – tí verri eisini á hesum øki. Í Danmark er einki krav um, at tú skalt koyra við vetrardekkum, tí har eru góð koyrilíkindi so at siga alt árið, sigur Fríðrikur Bláhamar.

Í Noreg, Svøríki og Finnlandi eru øðrvísi krøv, og har eru koyrilíkindini meir lík okkara. Í Svøríki og Finlandi skalt tú nýta vetrardekk og í Noregi skalt tú nýta kavaketur ella vetrardekk.

Í øllum trimum londunum skulu vetrardekkini hava eina mynsturdýpd við í minsta lagi 3,0 mm. Í Eysturríki er kravið í minsta lagi 4 mm á vetrardekkunum.

### Tað skal vera stuttligt at selja dekk

– Vit verða so javnan spurdir, um tað ikki er keðiligt bara at selja dekk. Og tað kann tað sjálvandi vera nakað um, og júst tí er tað, at vit gera so nógv upplýsingararbeiði umframt, sigur Fríðrikur Bláhamar.

– Í veruleikanum gera vit tað arbeiði, sum eitt bransjufelag fyrr dekkseljarar áttu at gjørt. Men eitt slíkt felag hava vit ikki í Føroyum, sigur Fríðrikur Bláhamar.

Hann vísir tó á, at vit saktans kundu havt eina slíka deild undir eitt nú Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

– Í Danmark hava tey tað tey kalla »Rådet for større dæksikkerhed« sum eina deild undir »Rådet for større færdselsikkerhed«, sigur Fríðrikur Bláhamar.

### Bjarni Djurholm hevur svarað Super Dekk

Tey á Super Dekk vóna, at hendan herferðina um reglur fyri dekk fer at geva úrslit.

– Vit hava fingið eina afturmelding frá Vinnumálaráðnum, sum sigur seg verða sinnað at viðgera hendan spurningin, nú broytingar skulu gerast í ferðslulógini. Tey fara at ráðføra seg við sínar stovnar, eitt nú Landsverkfrøðingin og Bileftirlitið, og so vænti eg, at vit frætta aftur, sigur Fríðrikur Bláhamar.

Men herferðin hevur eisini víst ans aðrastaðni. Eitt nú hevur danska bransjublaðið Motormagasinet skrivað um brævið, eins og Dækspecialisten, sum er blaðið hjá donsku dekkbransjuni.

### Super Dekk: – dekk og trygd

Fríðrikur Bláhamar sigur, at besta og tryggasta loysnin er at hava góð vetrardekk um veturin og góð summardekk um summarið.

– Tað finst einki dekk, sum er 100% trygt alt árið, tí er hetta okkara tilmæli, sigur Fríðrikur, sum leggur afturat, at hann ætlar sær vørumerkið »Super Dekk – dekk og trygd«.

– Tí vit koyra so nógv upp á tryggleikan, og tí er tað eisini, at vit t. d. skipa fyri dekkkvøldum, sum vit gjørdu fyri tveimum vikum síðani, sigur hann.

# Nýggj og kollveltandi regndekk

**Hydra-Grip – nýggja dekkið hjá GoodYear – er ment til at koyra á vátum vegi, og er tað tí sera væl egnað á vátu føroysku vegunum**

REGNDEKK

Í Skandinavia hava fleiri øki vátar vegir tríggjar av fýra døgum um árið í meðal, og í Føroyum man tað vera fýra av fimm døgum í meðal. Tað vita flestu bilførarar sum tí - sambært dekkframleiðarunum - leggja størstan dent á, hvussu dekkini klára seg á vátum vegi. Stórur munur er á førleikunum at standa fastur á vátum vegi, vísa nýggjastu dekkroyndirnar og -kanningarnar. Hesi úrslit hava elvt til, at nakrir dekkframleiðarar eru farnir at menna serstøk regndekk.

Regndekkið frá GoodYear eitur HydraGrip, sum er skapt til at sleppa undan vatnglíðing (aquaplanning) og at bremsa best møguligt á vátum vegi. Eisini førleikan at halda bilin á rættari kós, tá koyrt verður gjøgnum sving, hevur verið raðfest frammaliga.

Nýggju dekkini skilja seg frá øðrum við, at mynstrið og samansetingin av ymisku tilfarsliðunum er øðrvísi. GoodYear hevur skapt dekkmynstrið út frá tí, vit kenna frá tøknini í nútímans vetrardekkum við lamellum og drenrásum. Tað gevur eina ógvuliga smidliga viðberaflatu millum dekk og veg, har nógvir smáir kantar millum smáu lamellirnar skapa neyðugu gníggimótstøðuna (friktiónina) og neyðuga støðufestið.



*Svenski Goodyear stjórin fyri Norðurlond, Otto Drakenberg, Flemming Christensen, sølustjóri í Danmark, og Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk í Føroyum*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

FDM hevur roynt nýggju dekkini á GoodYear royndarbreytini í Mireval í Suðurfrankaríki. Teir siga, at »nýggju dekkni hava eyðsýnt ein betri førleika at standa føst á vátum vegi. Samanberandi bremsuroyndir við nýggju dekkunum og tey hjá kappingarneytunum vístu, at ítøkiligur fyrimunur var við HydraGrip-dekkunum á øllum økjum. Mest undranarvert var ein roynd, har tveir líka bilar - ein bilur við HydraGrip-dekkum og ein bilur við einum dekki frá kappingarneytanum - koyrdu við somu ferð á eini sirkulbreyt, har eitt øki var sprænt við vatni.

Í váta økinum var bilurin við HydraGrip-dekkunum næstan óávirkaður, meðan bilurin við dekkunum hjá kappingarneytanum flutti seg ein metur til síðuna«.

Royndin vísir, hvat kann henda, um tú koyrir ígjøgnum eitt vátt sving. Í ringasta føri fer bilurin so nógv til síðuna, at hann kemur yvir í hina koyribreytina ella fer av vegnum. HydraGrip er ment til at halda kósina í slíkum føri.

Super Dekk umboðar GoodYear í Føroyum og hevur HydraGrip-dekkini.

*Kelda: FDM - Motor nr. 4 apríl 2004*



